# Áki vann silvur

Seinasta vikuskifti vóru fimm íðkarar frá ÍSB til boccia-kapping í Oslo. Besta úrslitið fekk Áki Joensen, sum vann silvur í sínum bólki. Í innleiðandi umfarinum vann hann tveir av trimum dystum, og úrslitini annars lagaðu seg soleiðis, at Áki vann bólkin og kom í finaluumfarið saman við tveimum dønum og einum svia. Svianum møtti hann í semifinaluni. Hetta gjørdist ein ógvuliga spennandi dystur, sum Áki í evstu løtu vann 5-4. Í finaluni møtti hann síðan øðrum dananum, sum tó var stinnari og vann gullið. Í liðkappingini taptu Føroyar allar sínar dystir.



# Gullregn í Berlin

Stór svimukapping var í Berlin um vikuskiftið. Kappingin var bæði fyri rørslu- og menningartarnað og einir 600 svimjarar úr øllum heiminum vóru við. Føroysku luttakararnir vóru tey bæði 10 ára gomlu, Dann Akursmørk og Krista Mørkøre, sum tóku lut í barnabólkinum. Krista umboðaði ÍSB á fyrsta sinni. Harumframt var **Ragnvald** Jensen við. Hann var við í bólkinum S14, sum er fyri svimjarar við menningartarni. Svomið varð í 50 m hyli, og úrslitini vóru framúr góð : **Dann** vann 6 heiðursmerki ( 3 gull í 100 m frí, 50 m firvald og 50 m frí, 1 silvur í 50 m rygg og 2 bronsu í 50 m bringu og 100 m bringu). **Krista** vann somuleiðis 6 heiðursmerki (2 gull í 50 m og í 100 m frí; 2 silvur í 50 m rygg og 100 m bringu; 2 bronsu í 50 m bringu og 100 m rygg). Ragnvald vann 6 heiðursmerki ( 2 gull í 50 m bringu og 200 m frí, 4 silvur í 50 m og 100 m frí, 50 m rygg og 100 m bringu. Harumframt vórðu sett 5 føroysk met  og 9 persónlig met.

# Fara um fyrsta triðingin




*Á Sandi hevur spælið í nógvum førum verið nøktandi. Men úrtøkan hevur ikki staðið mát, og tí hevur liðið nú knívin á barkanum*

**Hóast tveir triðingar enn eru eftir, tá dystirnir í kvøld eru spældir, so fer tað longu nú at líkjast lagnudysti á Sandi, har Víkingur kemur á vitjan**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í átta dystum hevur B71 bara fingið fýra stig. Flestu av liðunum omanfyri B71 hava javnt og samt savnað sær nakað av stigum saman, og munurin upp til strikuna er nú fimm stig.

Víkingur er eitt av liðunum, sum er á teimum níggju stigunum, og tí líkist tað einum lagnudysti, tá B71 í kvøld tekur ímóti Víkingi. Fær B71 stig við sær úr dystinum, so fáa teir av álvara samband við kappingarneytarnar. Hinvegin kann støðan væl gerast heilt kritisk, um Víkingur fer avstað við stigunum.

Um so er, so munnu sandoyingar eisini fylgja væl við, hvussu leikur fer í Klaksvík. KÍ hevur veruliga fingið glið á seinastu dystirnar, og eftir at teir drógu svart tríggjar tær fyrstu ferðirnar, hevur liðið ikki tapt seinastu fimm ferðirnar. Og kunnu teir fáa fulla úrtøka hesaferð, er niðurflytingarvandin væl og virðiliga skumpaður burtur.

### B68 í góðari støðu

Niðurflytingarvandin er eisini nakað, sum Skála, ÍF og B68 enn ikki eru heilt leys av. Øll hava tey í kvøld dystir móti liðum, sum eru stødd ovari á stigatalvuni.

Skála hevur á pappírinum truplastu uppgávuna, tá teir taka ímóti framvegis ósigraða EB/Streymi. Hvussu víkir og vendir, so er EB/Streymur oddalið eftir fyrsta triðingin, men Skála hevur hinvegin fingið úrtøku seinastu dystirnar. Seinast við einum flottum javnleiki í Runavík. Og hartil stendur Skála seg vanliga væl ímóti júst EB/Streymi.

Á Toftum er fótbóltslagið gott, eftir at B68 vann á ÍF um vikuskiftið. Tann sigurin lyfti liðið upp á miðjuna á talvuni, og so er spurningurin, um tann støðan kann betrast. B36 hevur higar til bert verið eina ferð uttan fyri høvuðsstaðin, og í tí royndini komu teir aftur ongul í reyv.

Seinasti dysturin er í Gundadali, har HB tekur ímóti ÍF. ÍF hevur í mangar mátar verið positiva íkastið til Formula-deildina í ár, meðan HB hevur havt sínar trupulleikar at dragsast við. Hinvegin vóru púrasta greiðar ábendingar sunnudagin um, at leikliga kreppan er hæsað av hjá sigursvanda felagnum, og eftir stigaleysa vónbrotið í Streymnesi er einki at ivast í, at teir leggja nógv fyri. Eisini hóast ÍF loksins er fullmannað, nú øll leikbannini, sum stóðust av dystinum í Runavík, eru sitin av.

**Formula-deildin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 8 | 6 | - | 2 | - | 0 | 20 | 8 | 12 | 20 |
| 2 HB | 8 | 4 | - | 3 | - | 1 | 17 | 4 | 13 | 15 |
| 3 B36 | 8 | 3 | - | 4 | - | 1 | 10 | 5 | 5 | 13 |
| 4 NSÍ | 8 | 3 | - | 2 | - | 3 | 10 | 12 | -2 | 11 |
| 5 B68 | 8 | 3 | - | 2 | - | 3 | 8 | 11 | -3 | 11 |
| 6 ÍF | 8 | 3 | - | 1 | - | 4 | 12 | 16 | -4 | 10 |
| 7 Víkingur | 8 | 2 | - | 3 | - | 3 | 11 | 11 | 0 | 9 |
| 8 KÍ | 8 | 2 | - | 3 | - | 3 | 12 | 16 | -4 | 9 |
| 9 Skála | 8 | 1 | - | 3 | - | 4 | 7 | 17 | -10 | 6 |
| 10 B71 | 8 | 1 | - | 1 | - | 6 | 8 | 15 | -7 | 4 |

# Knørrur veksur

**Leygardagin fekk Róðrarfelagið Knørrur tveir nýggjar bátar, 5-mannafarið Tambar og 10-mannafarið Ormin Langa**

KAPPRÓÐUR
*Tíðindaskriv*

Róðrarfelagið Knørrur er í støðugari menning og er nú við nýggju bátunum fult á hædd við fremstu feløg, hvat bátum viðvíkir. Tað er eisini hugvekjandi at síggja, at felagið er einasta róðrarfelag í landinum, sum rør við øllum bátastøddum í summar.




*Við teimum báðum nýggju bátunum er Knørrur nú eitt "fullfiggjað" kappróðrarfelag við luttøku í øllum bátastøddum*

Leygardagin var hátíðarhald uttan fyri lítla neystið á Skálatrøð, har felagið heldur til. Umframt Magnus Gaard helt eisini Heri Kjærbo, marknaðarleiðari á Postverki Føroya, røðu. Heri helt, at Róðrarfelagið Knørrur er ein fyrimynd fyri onnur feløg, og at tað hevur dugað sera væl at sett fokus á uppgávuna og á menningina.

At stuðla einum so ídnum og modernaðum felagi sum Róðrarfelagnum Knørri, ið við bátanøvnum sínum samstundis er so grundfest í føroyskari tjóðarsøgu, er fyri Postverkið einisi at stuðla føroysku tjóðini, í og við at okkara tjóðarítrótt kann fáa so góðar karmar at virka undir, sum gjørligt.

Við bátum sínum Tambar, Jallinum, Jarnbardi, Knørri og Orminum Langa er Róðrarfelagið Knørrur nú vorðið eitt fullfiggjað róðrarfelag, ið kann luttaka við øllum bátastøddum.